Nr. 17/2019

Djóni Nolsøe Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um skattafrádrátt fyri virðiskort fyri ítróttar, mentanar- og frítíðarvirksemi, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Ætlar landsstýrismaðurin at broyta ásetingarnar í skattalógini, so virðiskort fyri ítróttar-, mentanar- og frítíðarvirksemi verða javnsett við onnur undantøk so sum hækkaðan barnafrádrátt, lækkað ansingargjøld og annað?

Viðmerkingar:
Býráðið í Runavíkar kommunu samtykti hin 31. oktobur at seta í verk skipanina "Spjaldur" sum eina royndarskipan í 2020. Skipanin hevur til endamáls at veita øllum borgarum í kommununi í aldrinum 6 - 18 ár eitt ognarkort á 2000 krónur árliga. Runavíkar kommuna skrivar á heimsíðu síni, at Spjaldrið verður eitt persónligt ognarkort, ið bert kann nýtast av einum og sama persóni, og tað verður galdandi fyri alt virksemi á ítróttar, mentanar- og frítíðarøkinum, sum er staðsett í Runavíkar kommunu. Kommunan vísir eisini á, at børnini og tey ungu sjálvi ráða fyri, um ognarkortið verður nýtt í fimleiki, fótbólti, kapprógving, klaverspæli, telving, frálæru í russiskum o.s.fr.

Runavíkar kommuna hevur spurt seg fyri hjá TAKS og løgfrøðiligum ráðgeva um skipanina. Hesi vísa á, at eingin forðing er fyri at seta skipanina í verk, men at virðiskortið er skattskyldugt hjá tí, sum fær ágóðan av tí. At lata eitt virðiskort til børn og ung kann javnsetast við aðrar fíggjarligar lættar fyri barnafamiljur so sum barnafrádrátt, ókeypis busskoyring ella lækkað ansingargjøld. Spurningurin er tí, um tað ikki er rættast at tillaga skattalógina, so at virðiskort fyri ítróttar-, mentanar- og frítíðarvirksemi verða javnsett við nevndu undantøk.

Á Løgtingi, 8. november 2019

Djóni Nolsøe Joensen